Nr. 5 19. januar 2022

# Kunngerð um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skráseting Føroya


Kapittul 1 Eigaraupplýsingar í feløgum, fevnd av vinnufelagalógini
Kapittul 2 Eigaraupplýsingar í fyritøkum fevndar av vinnufyritøkulógini
Kapittul 3 Eigaraupplýsingar í grunnum, fevndir av grunnalógini
Kapittul 4 Eigaraupplýsingar í ávísum feløgum fevnd av tryggingarlógini
Kapittul 5 Felags ásetingar um skráseting og almannakunngering
Kapittul 6 Revsing
Kapittul 7 Gildiskoma og skiftisregla


Við heimild í § 12, stk. 1 og 2, § 55, stk. 3, § 56, stk. 2, 3. pkt., § 57 a, stk. 6, § 58 a, stk. 5, og § 319, stk. 4 í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 og løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, og § 15 f og § 15 g, stk. 5 í anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, og § 56 b, stk. 4 í anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, og § 17, stk. 6 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, verður ásett:

## Kapittul 1
## Eigaraupplýsingar í feløgum, fevnd av vinnufelagalógini

*Løgligir eigarar*

*Fráboðan til kapitalfelagið um týðandi kapitalpostar*

**§ 1.** Ein og hvør, sum hevur ræði á kapitalpørtum í einum kapitalfelagi, skal boða felagnum frá um týðandi kapitalpostar, sbrt. § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini. Fráboðanin skal verða latin felagnum í seinasta lagi 2 vikur eftir, at eitt av mørkunum í § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini verður rokkið ella ikki longur er rokkið. Felagið førir upplýsingarnar í eigarabókina.

*Stk. 2.* Fráboðanin hjá kapitaleigaranum til felagið skal innihalda tær upplýsingar, sum ásettar í § 56, stk. 2 í vinnufelagalógini.

**§ 2.** Ein og hvør, sum hevur ræði á partabrøvum, sum verða handlað á einum reguleraðum marknaði ella á einum multilateralum handilsfasiliteti, og sum sbrt. reglum, ásettar við heimild í § 29, stk. 4 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v., er undantikin frá skylduni um at boða kapitalfelagnum frá sbrt. § 29, stk. 1 í sama anordningi, og er heldur ikki fevndur av skylduni um at boða kapitalfelagnum frá um týðandi kapitalpostar eftir § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini, sbr. tó stk. 2.

*Stk. 2.* Hóast stk. 1, skal fráboðan altíð gevast eftir § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini, tá ognarmarkið upp á 100% verður rokkið ella ikki longur er rokkið.

*Skráseting av týðandi kapitalpostum*

**§ 3.** Eitt kapitalfelag skal skjótast gjørligt, eftir at felagið hevur fingið fráboðan eftir § 1, stk. 1, skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya.

*Stk. 2.* Hevur eitt kapitalfelag ikki, í seinasta lagi 2 vikur aftaná stovnan av felagnum, fingið boð um kapitaleigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpostum, sbrt. § 1, stk. 1, skal felagið skjótast gjørligt skráseta hesi viðurskifti í kt-skipan Skráseting Føroya, sbrt. § 58, stk. 1 í vinnufelagalógini.

*Stk. 3.* Staðfestir eitt kapitalfelag, at tað ikki longur hevur kapitaleigarar, sum hava ræði á týðandi kapitalpostum í felagnum, skal hetta skrásetast skjótast gjørligt í kt-skipan Skráseting Føroya.

*Stk. 4.* Kapitalfelagið skal skjótast gjørligt skráseta eina og hvørja broyting til tær upplýsingar, sum eru fráboðaðar sbrt. stk. 1, um broytingin hevur við sær, at mørkini í § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini verða rokkin ella ikki longur eru rokkin.

*Skráseting av smærri nøgd av handhavapartabrøvum*

**§ 4.** Ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum í einum partafelagi, sum tilsamans hevur minni enn 5% av atkvøðurættinum hjá felagskapitalinum ella minni enn 5% av felagskapitalinum, skal í seinasta lagi 2 vikur eftir útveganina lata seg skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. tó § 57 a, stk. 4 í vinnufelagalógini.
*Stk. 2.* Skrásetingin, sbrt. stk. 1, skal innihalda tær upplýsingar, sum ásettar í § 57 a, stk. 2 í vinnufelagalógini.
*Stk. 3.* Tá ið eitt ella fleiri handhavapartabrøv, sum eru skrásett sbrt. stk. 1, verða avhendað, skal tað í seinasta lagi 2 vikur eftir avhendanina skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya, at tann, ið hevur avhendað partabrøvini, ikki longur hevur tey, eins og avhendingardagurin skal skrásetast, sbr. tó § 57 a, stk. 4 í vinnufelagalógini.

*Veruligir eigarar*

**§ 5.** Kapitalfeløg skulu savna upplýsingar um felagsins veruligu eigarar, undir hesum upplýsingar um rættindi hjá veruligu eigarunum, sbrt. § 58 a, stk. 1 í vinnufelagalógini.
*Stk. 2.* Rættindini kunnu fevna um:
1) Kapitalpartar í kapitalfelagnum, sum viðkomandi beinleiðis ella óbeinleiðis eigur, undir hesum møguligir kapitalpartar, og møguliga hvønn partabrævaflokk, teir hoyra til.
2) Ræði á annan hátt.

**§ 6.** Kapitalfelagið skal skráseta teir veruligu eigararnar og upplýsingarnar um, hvussu tann veruligi ognarrætturin er samansettur, í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 5, stk. 2. Dagfestingin fyri nær veruligi ognarrætturin er íkomin og møguliga hildin uppat, skal eisini skrásetast.
*Stk. 2*. Eigur ein persónur kapitalpartar, skal samlaða talið á kapitalpørtum býtt á atkvøðurætt og kapital skrásetast. Til ræði verður íroknað:
1) Kapitalpartar, har atkvøðurætturin er í luti hjá einari fyritøku, sum viðkomandi hevur ræði á.
2) Kapitalpartar, sum viðkomandi hevur sett sum trygd, uttan so, at veðhavari hevur ræði á atkvøðurættinum og boðar frá, at ætlanin er at brúka rættin.
*Stk. 3.* Eru kapitalpartar ogn gjøgnum eina røð av fyritøkum, sum ræði er á, skal hendan upplýsing skrásetast.
*Stk. 4.* Hevur kapitalfelagið ikki ella kann felagið ikki eyðmerkja veruligar eigarar, skal stjórn felagsins skrásetast sum veruligur eigari.
*Stk. 5.* Kapitalfelagið skal skjótast gjørligt skráseta upplýsingarnar um teir veruligu eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya eftir, at felagið hevur fingið kunnleika um, at ein persónur er blivin veruligur eigari og eftir hvørja broyting til tær upplýsingar, sum eru skrásettar.

## Kapittul 2
## Eigaraupplýsingar í fyritøkum fevndar av vinnufyritøkulógini

*Løgligir eigarar*

*Fráboðan til kommandittfelagið um týðandi eigarapartar*

**§ 7.** Sbrt. § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini, sbr. § 15 f í vinnufyritøkulógini, skal ein og hvør, sum eigur ognarpartar í einum kommandittfelagi, sum er skrásetingarskyldugt sbrt. § 2, stk. 3, nr. 2 í vinnufyritøkulógini, boða kommandittfelagnum frá um týðandi eigarapartar. Fráboðanin skal verða latin kommandittfelagnum í seinasta lagi 2 vikur eftir, at eitt av mørkunum í § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini verður rokkið ella ikki longur er rokkið.
*Stk. 2.* Eigarans fráboðan til kommandittfelagið skal innihalda tær upplýsingar, sum ásettar í § 56, stk. 2 í vinnufelagalógini, sbr. § 15 f í vinnufyritøkulógini.

**§ 8.** Ein og hvør, sum hevur ræði á eigarapørtum, sum verða handlaðir á einum reguleraðum marknaði ella á einum multilateralum handilsfasiliteti, og sum sbrt. reglum, ásettar við heimild í § 29, stk. 4 í anordning om ikrafttræden for

Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v., er undantikin frá skylduni um at boða kommandittfelagnum frá sbrt. § 29, stk. 1 í sama anordningi og er heldur ikki fevndur av skylduni um at boða kommandittfelagnum frá um týðandi eigarapartar eftir § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini, sbrt. § 15 f í vinnufyritøkulógini, sbr. tó stk. 2.

*Stk. 2.* Hóast stk. 1, skal fráboðan altíð gevast eftir § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini, sbrt. § 15 f í vinnufyritøkulógini tá ognarmarkið upp á 100% verður rokkið ella ikki longur er rokkið.

*Skráseting av týðandi eigarapørtum*

**§ 9.** Eitt kommanditfelag, ið er skrásetingarskyldugt sbrt. § 2, stk. 3, nr. 2 í vinnufyritøkulógini, sum hevur móttikið fráboðan um týðandi eigarapartar, sbrt. § 4, stk. 1, skal skjótast gjørligt eftir móttøkuna, skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya.

*Stk. 2.* Hevur kommanditfelagið ikki í seinasta lagi 2 vikur aftaná stovnan av kommanditfelagnum móttikið fráboðanir um eigarar, sum hava ræði á týðandi eigarapartar, sbrt. § 4, stk. 1, skal kommanditfelagið skjótast gjørligt skráseta hetta í kt-skipan Skráseting Føroya, sbrt. § 58, stk. 1 í vinnufelagalógini, sbr. § 15 f í vinnufyritøkulógini.

*Stk. 3.* Staðfestir eitt kommanditfelag, at tað ikki longur hevur eigarar, sum hava ræði á týðandi eigarapørtum í felagnum, skal hetta skrásetast skjótast gjørligt í kt-skipan Skráseting Føroya.

*Stk. 4.* Kommanditfelagið skal skjótast gjørligt skráseta eina og hvørja broyting til tær upplýsingar, sum eru fráboðaðar sbrt. stk. 1, um broytingin hevur við sær, at mørkini í § 55, stk. 1 í vinnufelagalógini, sbr. § 15 f í vinnufyritøkulógini, verða rokkin ella ikki longur eru rokkin.

*Veruligir eigarar*

**§ 10.** Íognarfeløg, kommanditfeløg og fyritøkur við avmarkaðari ábyrgd skulu savna upplýsingar um felagsins veruligu eigarar, undir hesum upplýsingar um rættindi hjá teimum veruligu eigarunum, sbrt. § 15 g, stk. 1 í vinnufyritøkulógini.

*Stk. 2.* Rættindini kunnu fevna um:

1) Eigarapartar í felagnum, sum viðkomandi beinleiðis ella óbeinleiðis eigur.
2) Ræði á annan hátt.

**§ 11.** Fyritøkan skal skráseta teir veruligu eigararnar og upplýsingarnar um, hvat ognarrætturin er samansettur av, í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 10, stk. 2. Dagfestingin fyri nær veruligi ognarrætturin er íkomin og møguliga hildin uppat, skal eisini skrásetast.

*Stk. 2.* Hevur ein persónur ræði á eigarapørtum, skal samlaða talið av eigarapørtum býtt á atkvøðurættindi og kapital skrásetast. Til ræði verður íroknað:

1) Eigarapartar har atkvøðurætturin er í luti hjá einari fyritøku, sum viðkomandi hevur ræði á.
2) Eigarapartar, sum viðkomandi hevur sett sum trygd, uttan so, at veðhavari hevur ræði á atkvøðurættinum og boðar frá, at ætlanin er at brúka rættin.

*Stk. 3.* Eru eigarapartar ogn gjøgnum eina røð av fyritøkum, sum ræði er á, skulu hesi ognarviðurskifti skrásetast.

*Stk. 4.* Hevur fyritøkan ikki, ella kann fyritøkan ikki eyðmerkja veruligar eigarar, skal dagliga leiðslan skrásetast sum veruligir eigarar. Íognarfeløg og kommanditfeløg, sum ikki hava eina leiðslu samansett av likamligum persónum skrásettir í kt-skipan Skráseting Føroya, skal skráseta tann ella teir likamligu persónar, sum standa fyri dagligu leiðsluni, sum veruligar eigarar.

*Stk. 5.* Fyritøkan skal skráseta upplýsingarnar um veruligu eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya skjótast gjørligt, eftir at felagið hevur fingið kunnleika til, at ein persónur er blivin veruligur eigari og eftir hvørja broyting til tær upplýsingar, sum eru skrásettar.

## Kapittul 3
## Eigaraupplýsingar í grunnum, fevndir av grunnalógini

*Veruligir eigarar*

**§ 12.** Sbrt. § 56 b í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, skulu vinnurekandi grunnar savna upplýsingar um grunsins veruligu eigarar, undir hesum upplýsingar um atkvøðurættin hjá teimum veruligu

eigarunum.

**§ 13.** Grunnurin skal skráseta teir veruligu eigararnar og upplýsingarnar um, hvat veruligi ognarrætturin er samansettur av, í kt-skipan Skráseting Føroya. Dagfestingin fyri nær veruligi ognarrætturin er íkomin og møguliga hildin uppat, skal eisini skrásetast. Um dagfestingin fyri veruliga ognarrættin ikki kann staðfestast, kann dagfestingin fyri skrásetingina nýtast.

*Stk. 2.* Viðvíkjandi grunsins nevnd, skulu upplýsingar um rættindi ikki skrásetast, uttan so, at teir einstaku limirnir í nevndini verða mettir at vera veruligir eigarar á annan hátt.

*Stk. 3.* Grunnurin skal skráseta navnið á tí bólki av persónum, í hvørs høvuðsáhugamáli grunnurin er stovnaður ella virkar, um teir einstaklingar, sum njóta gott av útlutan grunsins enn ikki kennast.

*Stk. 4.* Fyrstu ferð grunsins nevnd skal skrásetast sum veruligir eigarar, skal grunnurin skráseta upplýsingina í kt-skipan Skráseting Føroya.

## Kapittul 4
## Eigaraupplýsingar í ávísum feløgum fevnd av tryggingarlógini

*Veruligir eigarar*

**§ 14.** Sínámillum tryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar skulu savna upplýsingar um felagsins veruligu eigarar, undir hesum upplýsingar um rættindi hjá teimum veruligu eigarunum, sbrt. § 17, stk. 3 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

*Stk. 2.* Rættindini kunnu fevna um:

1) Eigarapartar í felagnum, sum viðkomandi beinleiðis ella óbeinleiðis eigur.
2) Ræði á annan hátt.

**§ 15.** Felagið skal skráseta teir veruligu eigararnar og upplýsingarnar um, hvat veruligi ognarrætturin er samansettur av, í kt-skipan Skráseting Føroya, sbrt. § 14, stk. 2. Dagfestingin fyri nær veruligi ognarrætturin er íkomin og møguliga hildin uppat, skal eisini skrásetast.

*Stk. 2.* Eigur ein persónur eigarapartar, skal samlaða talið á eigarapørtum, býtt á atkvøðurætt og kapital, skrásetast. Til ræði verður íroknað:

1) Eigarapartar, har atkvøðurætturin er í luti hjá einari fyritøku, sum viðkomandi hevur ræði á.
2) Eigarapartar, sum viðkomandi hevur sett sum trygd, uttan so, at veðhavari hevur ræði á atkvøðurættinum og boðar frá, at ætlanin er at brúka rættin.

*Stk. 3.* Eru eigarapartar ogn gjøgnum eina røð av fyritøkum, sum ræði er á, skal hendan upplýsing skrásetast.

*Stk. 4.* Hevur felagið ikki, ella kann felagið ikki eyðmerkja veruligar eigarar, skal stjórn felagsins skrásetast sum veruligir eigarar.

*Stk. 5.* Felagið skal skráseta upplýsingarnar um veruligu eigararnar í kt-skipan Skráseting Føroya skjótast gjørligt, eftir at felagið hevur fingið kunnleika um, at ein persónur er blivin veruligur eigari og eftir hvørja broyting til tær upplýsingar, sum eru skrásettar.

## Kapittul 5
## Felags ásetingar um skráseting og almannakunngering

*Skráseting umvegis kt-skipan Skráseting Føroya*

**§ 16.** Skráseting av upplýsingum við heimild í hesi kunngerð, og broyting í longu skrásettum upplýsingum, sum eru skrásettar við heimild í hesi kunngerð, skal fara fram umvegis sjálvavgreiðsluskipan inni á www.skraseting.fo, sbr. tó stk. 2-4.

*Stk. 2.* Til Skráseting Føroya fær sjálvavgreiðsluskipan inni á www.skraseting.fo, skulu fráboðanir til skráseting í kt-skipan Skráseting Føroya fara fram umvegis teldupost til Skráseting Føroya.

*Stk. 3.* Fráboðan til skrásetingar, sbrt. stk. 2, skal gerast á fráboðanarskjali frá Skráseting Føroya. Fráboðan og møgulig skjalfesting, skal latast í PDF-fílum, hvør sær.

*Skráseting av likamligum og løgfrøðiligum persónum við tilknýti til feløg o.fl.*

**§ 17.** Skrásetingin av likamligum og løgfrøðiligum persónum við tilknýti til feløg, fyritøkur, grunnar, o.fl. sum eigarar, skal geva upp fult navn, starv í felagnum, p-tal, ríkisborgaraskap við føðing, bústaðaradressu og bústaðarland fyri likamligar persónar, ella navn, skrásetingarnummar og heimstað fyri løgfrøðiligar persónar.

*Stk. 2.* Hevur likamligi persónurin ikki eitt p-tal ella hevur tann løgfrøðiligi persónurin ikki eitt skrásetingarnummar skulu hesar upplýsingar gevast upp:

1) Fyri likamligar persónar uttan p-tal, skal tað í samband við skrásetingina sláast inn upplýsing um føðingardag, ríkisborgaraskap við føðing, kyn, passnummar ella nummar frá samleikaprógvi, sum kann nýtast við innferð í einum Schengenlandi, umframt útgávuland fyri passið ella samleikaprógvið. Mynd av galdandi passi ella samleikaprógvi, sum kann nýtast við innferð í einum Schengenlandi skal leggjast við fráboðanini.
2) Fyri løgfrøðiligar persónar uttan skrásetingarnummar, skal felagsskráin, í hvørjari tann løgfrøðiligi persónurin er skrásettur og skrásetingarnummarið gevast upp, umframt upplýsingar um møguligt skattaeyðmerkingarnummar í heimlandinum. Formligt prógv, sum í mesta lagi kann vera 3 mánaðar gamalt, fyri, at tann løgfrøðiligi persónurin er lógliga til í heimlandinum, skal leggjast við fráboðanini.

*Ábyrgd fyri skráseting í kt-skipan Skráseting Føroya*

**§ 18.** Teir løgfrøðiligu persónar, ið eru fevndir av hesi kunngerð, kunnu heimila einum fráboðara at umboða felagið mótvegis Skráseting Føroya, og til at fremja skrásetingar.

*Stk. 2.* Ein fráboðari, sbrt. stk. 1, skal svara fyri, at skrásetingin fer fram á lógligan hátt, undir hesum, at neyðug fulltrú er útvegað, og at skjalprógvanin í sambandi við skrásetingina hevur gildi.

*Stk. 3.* Stk. 2 fevnir eisini um skráseting av upplýsingum um handhavapartabrøv, sbrt. § 4. Við skráseting av handhavapartabrøvum, sbrt. § 4, skal við skrásetingini, um skrásetingin ikki verður framd av eigaranum sjálvum, fylgja ein fulltrú, sum heimilar fráboðaranum at fremja skrásetingina vegna eigaran.

*Kunngering í kt-skipan Skráseting Føroya*

**§ 19.** Upplýsingar um týðandi kapitalpostar og eigarapartar, sum eru skrásettar við heimild í §§ 3 og 9, verða almannakunngjørdar í kt-skipan Skráseting Føroya, sbrt. § 58, stk. 3 í vinnufelagalógini og § 15 f í vinnufyritøkulógini.

*Stk. 2.* Upplýsingar um handhavapartabrøv, sum eru skrásettar sbrt. § 4, stk. 1 og 4, verða ikki almannakunngjørdar, men kunnu einans verða latnar víðari til almennar myndugleikar, sbrt. § 57 a, stk. 5 í vinnufelagalógini.

*Stk. 3.* Upplýsingar um veruligar eigarar skrásettar sbrt. §§ 6, 11, 13 og 15, verða almannakunngjørdar í kt-skipan Skráseting Føroya, sbrt. § 58, stk. 3 í vinnufelagalógini, § 15 g, stk. 5 í vinnufyritøkulógini, § 56 b, stk. 4 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og § 17, stk. 6 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

**§ 20.** Ein og hvør hevur atgongd til upplýsingar um veruliga eigarans navn, føðingarmánað og føðingarár, ríkisborgaraskap, bústaðaradressu og bústaðarland, umframt slag og vavið av rættindunum hjá veruliga eigaranum, sbr. tó stk. 2.

*Stk. 2.* Upplýsingar, sbrt. stk. 1, sum Skráseting Føroya ikki hevur kunngjørt í kt-skipan Skráseting Føroya, kunnu fáast til vega, við at venda sær til Skráseting Føroya, sbr. tó § 21.

**§ 21.** Skráseting Føroya kann heilt ella partvís lata vera við at kunngera upplýsingar um eigarar í serstøkum støðum, har Skráseting Føroya metir, at kunngering kann føra við sær ósamsvarandi stóran váða fyri sviki, burturflyting, penganoyðslu, harðskapi, hóttan ella líknandi. Er tann veruligi eigarin ikki komin til lógaldur ella er hann ómyndigur, kann Skráseting Føroya somuleiðis lata vera við at kunngera ítøkiligar upplýsingar.

*Stk. 2.* Skráseting Føroya kann savna ummæli frá øðrum skikkaðum myndugleikum, áðrenn avgerð eftir stk. 1 verður tikin.

*Stk. 3.* Hvidvasksekretariatet og aðrir skikkaðir myndugleikar kunnu fáa upplýsingar, sum eru undantiknar frá kunngering, sbrt. stk. 1, við at venda sær til Skráseting Føroya.

## Kapittul 6
## Revsing

**§ 22.** Brot á § 1, § 2, stk. 2, §§ 3, 4, 6 og 7, § 8, stk. 2, §§ 9, 11, 13 og 15 verður revsað við sekt.

## Kapittul 7
## Gildiskoma og skiftisregla

**§ 23.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. februar 2022.
*Stk. 2.* Teir løgfrøðiligu persónar, ið eru fevndir av hesi kunngerð, og sum eru stovnaðir áðrenn kunngerðarinnar gildiskomu, skulu í seinasta lagi 7 mánaðir aftaná gildiskomuna lúka krøv kunngerðarinnar.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 19. januar 2022

**Magnus Rasmussen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)